## Fótaspor friðað



Fornfrøðimyndugleikar í amerikanska statinum Kalifornia hava lýst staðið, sum Apollo 11 lendi á á mánanum í 1969, sum friðað øki. Apollo 11 var tað fyrsta mannaða rúmdarfarið, sum setti seg á mánan, og friðingin er lýst sambært reglum hjá ST. Á tí friðaða staðnum eru fótasporini hjá teimum fyrstu og higartil einastu jarðarbúgvunum, sum hava sett fótin á mánan, Neil Armstrong og Buzz Aldrin. Har er eisini myndatólið, sum Neil Armstrong brúkti, tá hann tók hesa myndina av felaga sínum.

## Ganga á páskum

Skírishósdag 1. apríl verður barnatúrur: Varðaholan og viðarlundin í Kerkjum (í Havn) Farið verður av Kunningarstovuni kl. 14.00. 2. páskadag 5. apríl kl. 14.30 verður gongutúrur: Rulla páskaregg í Kúrdali. Vit møtast við Føroya Tele og ganga so gjøgnum Langadal oman til Kúrberg. Havið heit og góð gonguklæðir og ein heitan drekkamunn og matpakka við. Tilmelding á tlf. 302425 ella torsinfo@torshavn.fo

# Tavan 10 miljónir í avlopi



**Gulllaksavirkið Tavan hevði heilar 10 miljónir krónur í avlopi í fjør. Hetta er soleiðis nógv tað besta árið hjá virkinum nakrantíð, síðan felagið fór undir gulllaksavirksemi í Leirvík í 1994**

METAVLOP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er bara so heilt fantastiskt, at tað næstan ikki kann vera satt.

Leingi hevur ljóðað, at gulllaksavirkið Tavan í Leirvík hevur havt eitt rættiliga gott ár í fjør. Nú váttar stjórin, Jóan Magnus Rasmussen, at varhugin er rættur, og at felagið í fjør hevði nógv tað besta árið í søgu felagsins.

Tá hann hevur verið spurdur um úrslitið, hevur hann sagt, at tað ikki verður endaliga greitt fyrr enn í apríl – og fyrr enn úrslitið fyriliggur, vil hann einki siga.

Stjórin hevur kortini sagt, at árið í fjør hevur verið eitt gott ár, men hvussu gott, hevur hann ikki viljað váttað, fyrr enn vit spurdu hann í morgun.

Í morgun sigur Jóan Magnus Rasmussen, at úrslitið fyriliggur, og at avlopið í 2009 er heilar 10 miljónir krónur.

- Roknskapurin er nú liðugurm, og hetta er úrslitið, leggur hann aftrat.

Stjórin sigur seg fegnast um gongdina og sigur seg hava nógv at takka sínum arbeiðsfólki og veitarum fyri.

- Hetta er nógv tað besta árið hjá okkum, síðan vit fóru undir gulllaksaframleiðslu á Tavuni í 1994, sigur Jóan Magnus Rasmussen.

Tavan í Leirvík arbeiðir gulllaks í summarhálvuni og upsa í vetrarhálvuni.

### Eru til reiðar

Stjórin í Tavuni sigur, at tey keyptu fyrstu gulllaksalastina hin 8. apríl í fjør. Tað vóru Eysturbúgvin og Vesturbúgvin, sum komu við fyrstu lastini.

Tá vertíðin var úti, hevði Tavan keypt tilsamans 11.200 tons av gulllaksi, sum eisini er besta árið í nøgd hjá felagnum nakrantíð.

Spurdur, nær gulllaksavirksemi byrjar í ár, sigur Jóan Magnus Rasmussen, at tað verður einaferð í apríl.

- Vit arbeiða upsa enn, og tað fara vit at gera, til gulllaksavertíðin byrjar.

Jóan Magnus Rasmussen sigur, at tey fyrireika seg til gulllaksin, meðan upsi verður arbeiddur, og tí tekur tað kanska bara ein dag at leggja um.

- Vit eru til reiðar, tá tey fyrstu skipini fara á gull-

# Partrolarar á upsaveiði draga svart



*Fiskiskapurin hjá partrolarunum er sera vánaligur í løtuni, og hetta sæst eisini aftur á landingartølunum*

Mynd: Vilmund Jacobsen

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Veiðan hjá partrolarunum, sum royna eftir upsa, er sera vánalig í løtuni. Skipini fáa snøgt sagt einki, og hetta sæst eisini aftur í landingunum, sum eru um dagarnar.

Í gjár landaðu Polarhav og Stjørnan 80.000 pund í Saltangará. Skipini brutu túrin av fyri veður, men høvdu kortini verið úti tað mesta av tíðini.

Menn siga, at upsaveiðan er sera vánalig í løtuni.

Stelkur og Bakur landa í Saltangará í morgin, og hjá teimum hevur túrurin heldur ikki vignast.

Á Landingarmiðstøðini Kongshavn vænta tey eisini Eydnu fyri páskahalguna. Eydna partrolar saman við Beinissvørði, sum landar í Vági.

Frægasta landingin í Saltangará seinastu dagarnar var fríggjadagin, tá Rókur og Lerkur landaðu sløk 200.000 pund av upsa.

Í vikuni hevur garnaskipið Oknin eisini landað í Saltangará. Teir høvdu umleið 14.000 pund av svartkalva.